# Verkstaður til føroyska mótaframleiðslu

**Diana Borgnýardóttir og mamma hennara Borgný Dam Patursson hava síðani í september mánaði í ár arbeitt saman við at framleiða handgjørd klædnapløgg við føroyskum sniði. Ein spennandi tíð liggur fyri framman. Tær flyta vørur til útlandið, og leygardagin letur Diana upp ein verkstað í Syðrugøtu**



*Diana Borgnýardóttir her avmyndað saman við døtrunum Terna, sum er 11 ár og Sølja, sum er 8 ár. Tær eru í klæðum, sum mamman og omman hava ávíkavist seymað og sniðgivið*

*Mynd: Maria Olsen*

KLÆÐIR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin letur Diana Borgnýardóttir upp ein verkstað í Syðrugøtu, har hon fer at gera klæðini, sum mamma hennara, Borgný Dam Patursson hevur sniðgivið og sum tær fyrst og fremst selja til útlandið.

Hetta er nakað, sum tær báðar hava fingist við í einar tríggjar mánaðir, men við nýggja verkstaðnum hevur Diana fingið eitt arbeiðsstað. Føroyingar fáa samstundis møguleikan til at keypa pløggini, sum tær eru vorðnar kendar fyri í útlandinum.

Á verkstaðnum fara Diana og mamma hennara at arbeiða við teimum bíleggingunum, sum tær hava niðurfyri og fara at fáa.

Beint nú fæst Diana við at leggja ta seinastu hondina á tey klæðini, sum vera til sølu á verkstaðnum, tá hann letur upp leygardagin. Hon hevur fingið eina vinkonu at hjálpa sær við at seyma, so at alt verður klárt til tíðina.

Annars ætlar Diana ikki, at verkstaðurin skal vera opin hvønn dag, tí tað væntar hon fer at órógva tað dagliga arbeiðið ov nógv.

– Tá tú selur til útlandið mást og skalt tú levera til tíðina, ella kann man vænta sær eina sak upp á høvdið, sigur Diana.

Hon sigur, at verkstaðurin verður opin eftir avtalu í framtíðini, men ætlar tó at hava opið hvønn leygardag í jólamánaðinum frá klokkan 10 til 17.

### Viðurkenning

Diana greiðir frá, at tær útflyta pløgg til lond sum Eysturríki, Noreg, Danmark, Svøríki og Holland. Fyrr í ár vórðu tær bodnar við á eina altjóða mótamessu, har mótasýningar vóru. Pløggini hjá teimum vórðu eisini sýnd fram á messuni, har professionell myndafólk tóku myndir.

Ógvuliga tilvildarliga fingu tær báðar at vita, at vørur hjá teimum stóðu í einum kendum italienskum mótablaði. Hetta gjørdi, at áhugin rættiliga fekk luft undir veingirnar. Og Diana sær hetta avgjørt sum eina viðurkenning.

Tær báðar hava annars verið sera varnar við at siga nakað um áhugan uttanlanda, og eru tað framvegis, tí tær halda tað vera betur at bíða til alt er meira greitt og komið í eina fasta legu.

Diana vil tó siga so mikið sum, at komandi ár koma fleiri av teirra kundum til Føroya í fimm dagar.

– Tað koma eini 22 fólk hendanvegin, og ætlanin er at vísa teimum runt í landinum og at hava mótasýningar við okkara vørum, greiðir Diana frá.

Borgný og Diana hava fyrireikað hetta í eitt ár ella gott tað, men ikki fyrr enn í september var alt klárt til at byrja.

Diana játtar, at endamálið er at kunna liva av tí, og tí leggja tær so stóran dent á at fáa útlendskan marknað.

– Tað er ikki so lætt at liva av slíkum her heima, tí hava vit lagt okkum eftir útlandinum. Tað er so øgiliga nýtt enn, men sum er sær tað avbera gott út, sigur Diana Borgnýardóttir, og leggur afturat, at tær hava gjørt av at selja í Føroyum eisini, tí tær hava fingið so nógvar áheitanir um tað frá fólki.

# Kvinnukvøld í Leikalund

**Fríggjakvøldið fær Leikalund forkunnuga vitjan. Tað verða teir tríggir rithøvundarnir Dagny Joensen, Oddvør Johansen og Turið Kjølbro, ið fara at siga frá bókum sínum, sum júst eru komnar í bókabúðirnar**

TÍÐINDASKRIV
*Leikalund*

Eitt áhugavert kvinnukvøld verður í Leikalund í Klaksvík fríggjakvøldið, har tríggir kvinnuligir rithøvundar fara at greiða frá teirra bókum, sum júst eru komnar út.

Dagny Joensen fer at greiða frá bókini Terradropar. Kvinnumyndir í okkara tíð. Dagny Joensen skrivar um kvinnuleiklutin í nútíðini, hvussu konufólk í veruleikanum liva og virka, út frá teimum fortreytum, sum tær hvør í sínum lagi hava. Hon hevurr havt samrøður við kvinnur í aldursbólkinum 23 - 70 ár, og tær siga frá dreymum og vónum og hyggja aftur á lívið úr einum kvinnuligum sjónarhorni.

Oddvør Johansen fer at siga frá skaldsøguni Sebastians hús, ið vann skaldsøgukappingina hjá Listastevnuni 2004. Karmurin um søguna er Sebastians hús, sum er vitin av Borðuni, fluttur til Havnar. Dómsnevndin segði um hesa skaldsøgu, at skaldsøgan er ein rámandi lýsing av stríðnum millum ein vakran og frælsan dreymaheim og so veruleikans krøv og tvingsil. Við hesari skaldsøgu hevur føroyskur skaldskapur fingið eina perspektivríka heimstaðarlýsing aftrat.

Turið Kjølbro hevur ritstjórnað nýggju bókina, sum Krabbameinsfelagið gevur út, sum eitur Okkara millum. Bókin er savn við 20 tekstum frá føroyingum, ið skriva um, hvussu tað er at liva við krabbameini; 15 teirra eru tekstir frá fólki, ið eru vorðin frísk av krabbameini, 4 tekstir frá fólki, ið hava mist maka ella foreldur av krabbameini, og 1 tekstur frá kvinnu, ið hevur fingið at vita, at hon ikki verður frísk av krabbameini. Hetta eru fjølbroyttir, flógvir, bersøgnir, húðaleysir og sannførandi tekstir, ið veruliga nema teg. Felagsnevnarin er ikki bara krabbamein, men eisini lívsgleði, lívsvilji og lívsjáttan.

Høvi verður at tosa við tær og at fáa bøkurnar signeraðar. Kvøldið verður óformelt; Byrjað verður klokkan 20, og okkurt leskiligt verður at fáa afturvið. Vónandi nýta fólk høvi at heilsa upp á høvundarnar og fáa eitt hugnaligt kvøld úti í Leikalund.

# Kári Svensson í Leikalund

**Fríggjadagin 3. desember klokkan 16 letur upp ein nýggj framsýning í Leikalund við listaverkum eftir Kára Svensson**

TÍÐINDASKRIV
*Leikalund*

Myndirnar hjá Kára Svensson broytast allatíðina. Listamaðurin leitar, søkir og finnur støðugt nýggjar leiðir, sjálvt um myndevni er hitt sama. Seinnu árini hava vit sæð nógvar stórar monumentalar myndir har dentur hevur verið lagdur á abstraktar litsamansetingar. Hesar verða eins og egin litlandsløg har tú kanst vitja og fáa egnar upplivingar.

Kári Svensson er í dag vorðin ein av teimum heilt kendu føroysku málarunum, og hann er eisini sera virkin listamaður. Við á framsýningini í Leikalund eru fleiri nýggir oljumálningar. Kári Svensson er føddur í 19545 og longu sum tannáringur hevði hann sína fyrstu framsýning. Síðan hevur hann ferðast víða hvar við sínum framsýningum. Hann hevur sýnt fram í Norðurlondum, Baltisku londunum, Hollandi og so fjarskotin støð sum Singapore og New York hevur Kári eisini vitjað við síni list.

Kári Svensson var farin um tey tredivu, áðrenn hann av álvara fór at mála. Myndevni er í størsta mun náttúran og náttúruupplivingar, men eisini bygdir og fólk eru at síggja. Stílurin er abstrakt ekspressionalisma.

Gunvá við Keldu, komandi býráðslimur í Klaksvík, letur framsýningina upp, og limir frá Klaksvíkar Musikkskúla spæla nøkur løg til ferniseringina.



*Kári Svensson letur upp listaframsýning í Leikalund í Klaksvík fríggjadagin klokkan 16*